Dimmalætting

7 kr.

NR. 19 • Týsdagur 15. februar 1994 • 117. árgangur • Tlf. 11212

Stórur áhugi fyri fiskiskapi í Sierra Leone

Í vikuni sum fór varð lýst eftir skipum til fiskiskap í Sierra Leone. Brúk er í fyrsta lagi fyri fýra skipum. Fleiri hava longu gjørt vart við seg.

GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN

– Fleiri hava longu sýnt fiskiætlanunum í Sierra Leone áhuga.

Hetta sigur Atli Poulsen, ið er ein teirra, ið leggur ætlanirnar til rættis.

Møguleiki er at fiska fiskasløg sum tunfisk, rækjur, høgguslokk og annað. Higartil er tað serliga tunfiskur, ið hevur havt áhuga hjá teimum, ið hava gjørt vart við seg.

– Onkur hevur eisini sýnt áhuga fyri høgguslokkafiskiskapi. Men enn hevur ongin sagt seg áhugaðan at veiða rækjur, sigur Atli Poulsen.

Formellu loyvini eru ávegis úr Sierra Leone. Atli Poulsen sigur, at so skjótt sum onkur av teimum áhugaðu hava tikið endaliga støðu, kunnu fyrstu skipini fara avstað.

Hóast talan bert er um fýra skip í fyrsta lagi, er møguleiki at vaksa talið á føroyksum skipum upp ímóti tjúgu.

Avtalan ber í sær, at í minsta lagi 12 prosent av veiðuni skulu leggjast upp í Freetown í Sierra Leone. Restina av veiðuni kunnu føroyingar gera við sum teimum lystir. Ein møguleiki er at avreiða á Kanarisku Oyggjunum. Men møguleiki er eisini at leggja veiðu upp í grannalandinum hjá Sierra Leone, Guinea.

Hildið verður, at hóast fiskaprísirnir í Vesturafrika eru heldur lægri enn á t.d. Kanarisku Oyggjunum, loysir tað seg best at selja fiskin í Sierra Leone ella í onkrum grannalandi. Teinurin til Kanarisku Oyggjarnar er heldur langur.

Blandað úrslit hjá Nónhamri

Fiskiskapurin hjá Nónhamri í Barentshavinum hevur verið góður, og reiðaríið letur væl at samstarvinum við russar. Men ávísir trupulleikar hava verið við góðskuni.

GEORG L. PETERSEN

– Samstarvið við russar hevur verið fyrimyndarligt. Tað hevur eisini gingist væl í samstarvinum millum teir 19 russararnar og 19 føroyingarnar við Nónharmri, sigur Olaf Nielsen, frá reiðarinum Marine Sea Transport, sum eigur Nónhamar, og er skrásett í Panama.

Nónhamar er á triðja túrinum nú, og hevur 350 tons av saltfiski inni. Í løtuni eru teir í Hammerfest eftir meira salti. Túrarnir báðir frammanundan hava ikki givið tað av sær, sum hevði verið ynskiligt.

A fyrsta túrinum var fiskurin ikki nóg góður, og á tí næsta var alt ov nógv saltað, sambært reiðarinum.

Tað hava verið rykti um, at tað ikki gekk so gott, og at føroyska manningin hótti við at fara av, tí avrokningin var ov lítil.

– Hetta kenni eg einki til. Men teir fyrstu túrarnir vóru skerdir bæði við nøgd og góðsku, verður sagt av reiðarinum.

Avtalan við russar gongur út í august mánaði, so skjótt skulu umboð fyri Marine Sea Transport og russar aftur til samráðingarborðið.

– Føroyska manningin kostar væl meira enn tann russiska, so helst verður ynski sett fram av russum um at minka nakað um føroysku manningina. Men tað stendur fast, at skipið ikki fer at sigla uttan føroyingar, sigur Olaf Nielsen frá Marine Sea Transport.

Koss setti heimsmet í 5000 m kappingini

Stúgvandi fult av fólki sóu norðmannin, Johan Olav Koss, í »Víkingaskipinum« í Hamar sunnudagin seta nýtt heimsmet og vinna OL-gullmerkið á 5000 metra teininum í skoyturenningini.

DIA MIDJORD

Olympisku Leikirnir í Lille hammer hava lagt tveir kappingar-dagar aftur um bak. Og hesar dagar hava vit fingið bæði heimsmet og aðrar óvæntaðar gull-vinnarar.

Koss hetja

5000 metra skoyturenningin hjá monnum varð hildin sunnudagin kl. 15.00. Í fyrstu paring luttók Kjeld Storelid, og hann megnaði at taka gamla OL-metið frá svianum Thomas Gustavsson. Tíðin 6.42,68 min. hjá Storelid tryggjaði honum silvur.

Annar av skoyturennarunum í par nr. 4 var Johan Olav Koss. Hann legði hart út, og tað gjørdist alt meira greitt, at hann eisini fimtu ferðina fór at seta nýtt heimsmet á 5000 metrum. Hetta gjørdi Johan Olav Koss frammanfyri stúgvandi fullari skoytuhøll í Hamar sunnudagin. Hollendingurin, Ritche Ritzma, royndi aftaná at fanga tíðina hjá norðmanninum, men hann megnaði hvørki bestu- ella næstbestu tíðina, og bleiv sostatt nr. 3.

Heimsins sterkasti og besti skoyturennari hevði tíðina 6.36,96 min.

Aðrar kappingar

Fyrsta gullmerkið í OL-kappingum fór til USA. Ungi amerikanski skíðarin, Tommy Moe, stjól gullmerkið í strok-kappingini frammanfyri snútanum á norsku hetjuni, Kjetil Andre Aamodt. Bert 4/100 partar av einum sekundi vóru á muni millum nr. 1 og 2.

Fyrrapartin í gjár vunnu norðmenn gull og silvur í 30 km. skíðrennikappingini. Heilt óvæntað gjørdist Thomas Alsgaard vinnari við tíðini 1 tíma, 12 min. og 26 sekund. Bjørn Dæhlie kom næstur á mál við tíðini 1 tíma, 13 min. og 14 sek.

Sunnudagin vórðu tveir spennandi dystir leiktir í Íshockey-kappingini. Svøríki og Slovakia leiktu javnt 4-4. Og dysturin millum USA og Frankaríki endaði við somu tølum.

Fýratúsund ferðafólk færri sjóvegis í 1993

Síðani MS. Winston Churchill gavst við ferðafólkasigling uppá Føroyar, er ferðafólkatalið sjóvegis lækkað við sløkum fýratúsund. Í 1992 ferðaðust gott 9.000 fólk til Føroyar um Hanstholm og Esbjerg. Í 1993 var talið gott 5.000. Sambært hagtølum ferðaðust bert 500 fleiri um Bergen í 1993 enn í 1992.

GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN

Tað kom sum ein bumba, tá tað frættist, at DFDS ætlaði at gevast við ferðafólkasigling uppá Føroyar eftir mong harrans ár í hesi siglingini. Ikki sørt undrunarvert ljóðaði tað, at DFDS og Smyril Line vóru komin ásamt um, at DFDS hereftir skuldi vera generalumboð hjá Smyril Line í Danmark. Alt sýntist vera avrátt í sátt og semju.

Men Ferðafólkavinnan merkti skjótt, at bert ein farleið var millum Danmark og Føroyar í hásummartíðini. At Smyril Line leiðaði Smyril at sigla úr Hanstholm var bert viðfáningur. Eimans hálvtannaðhundrað fólk nýttu ta rutuna.

Minkaði við sløkum helmingi

Nú tølini fyri ferðandi eru gjørd upp fyri 1993 sæst, at ferðafólkatalið er lækkað úr gott níggjutúsund niður í gott fimmtúsund; ein minking uppá umleið fýratúsund ferðandi. Hetta svarar á leið til tað, Winston Churchill sigldi við í 1992. Spurningurin er, um ferðafólkatalið er minkað, tí Churchill nøktaði ein tørv, ið Norrøna ikki nøktar.

Signar á Brúnni, landsstýrismaður í ferðavinnumálum, hevur onga beinleiðis frágreiðing hesum viðvikjandi; men ein orsøk kann vera vantandi marknaðarføring.

– Føroyska ferðavinnan hevur ikki verið serliga dugnalig at marknaðarføra Føroyar sum ferðavinnuland, tað kann vera ein orsøk. Hinvegin vænti eg, at munandi broytingar fara fram innan marknaðarføring av føroyskari ferðavinnu komandi árini, sigur Signar á Brúnni, landsstýrismaður. Hann vísir ikki aftur, at best var við tveimum ferðafólkaskipum í hásummartíðini.

Bert eitt flogfelag

Um somu tið sum tølini á ferðandi sjóvegis vísa eina stóra minking síðan bert eitt felag fór at røkja ferðasambandið millum Danmark og Føroyar, kom landsstýrismaðurin í ferðavinnumálum við áheitan á Maersk Air at gevast við flogferðsluni. Spurdur um tølini í sambandi við sjóvegisflutningin ikki ræða landsstýrismannin sigur hann, at tað gera tey ikki.

– Talið á ferðandi við Maersk Air er so lágt, at hóast teir gevast, kemur Atlantsflog helst ikki at flúgva fullsett, sigur Signar á Brúnni. Hann sær onga orsøk til, at tvey flogfeløg eru um føroyarutuna.

Signar á Brúnni viðgongur tó, at skal ferðafólkatalið loftvegis minka samsvarandi tí ferðafólkatali, Maersk Air flýgur við, so er onki vunnið.

Í ferðavinnutjóðum uttanlands verður hildið sera týdningarmikið, at ferðamøguleikarnir inn í landið eru so fjølbroyttir og góðir sum tilber. Hesum sjónarmiði tekur stjórin í Ferðaráð Føroya, Jan Mortensen, undir við.

– Sum heild má metast, at jú fleiri ferðasambond til Føroya, bæði loftvegis og sjóvegis, jú betur er. Ein av fyritreytunum fyri at vit kunnu vaksa um ferðavinnuna, er at infrastruktururin er so góður sum tilber; ikki bara innlendis, men eisini millum lond, sigur Jan Mortensen, ferðavinnustjóri.

Á Smyril Line verður hildið, at minkaða ferðafólkatalið sjóvegis millum Føroyar og Danmark er at finna í búskaparkreppuni í Føroyum.

Føstulávint

Gekkaskortar, smyrsl, tunnur og kattakongar. Í gjár upprann dagurin, nógv børn hava glett seg til. Føstulávintsmánadagur. Skipað varð fyri tiltøkum kring alt landið. Sjey vikur eru nú til páskir, og føstulávint boðar frá, at várið og ljósari tíðir nú eru í nánd, og dagarnir leingjast.

Gamal siður í Føroyum er, at dansað verður ikki í føstu, tað vil siga tær sjey vikurnar millum føstulávint og páskir.

Føstulávint er upprunaliga ein siður, ið hevur uppruna úr heidnari tíð.

Tað sum børn í dag stuttleika sær við, m.a. at sláa pott ella tunnu, hevði upprunaliga ein boðskap ella merking. At sláa tunnu skuldi ímynda bardagan millum summar og vetur, at sláa pottar skuldi mana fólk, ið gingu aftur, í jørðina og so framvegis.

Myndamaður okkara var í býnum í gjár, og tók hesa grýlumyndina.

FOÍ á veg inn í oljuøldina

Virksemið verður nú formaliseráð so felagið kann virka sum seriøsur stovnur í framtíðini. Stovnandi aðalfundur verður 25. februar

PÓL Á KLETTI

Tvey tey fyrstu loyvini til seismiskar kanningar á føroyskum øki eru givin, og í april kemur fyrsta skipið at gera kanningar.

Føroyar byrja tá oljuøldina, og tað krevur, at alt arbeiði her á landi, oljuvinnuni viðvíkjandi verður formaliseráð. Og oljufyrireikingarnevndin hevur gjørt eitt frágera gott arbeiði, nú boðið verður til seismiska arbeiðið í Føroyum.

Áhugabólkurin Føroya Oljuíðnaður, sum hevur verið samansettur av verka-, arbeiðsgevara-, yvirmanna- og øðrum áhugaðum feløgum, verður nú formliga skipaður sum felag. Stovnandi aðalfundur verður mikudagin 25. februar í hølum Føroya Arbeiðarafelags.

Fleiri stór feløg eru við, og nú arbeiðið verður formaliserað, kann felagið virka sum ein seriøsur stovnur.

Við eru Føroya Arbeiðarafelag, Føroya Arbeiðsgevarafelag, handverkarar, Maskinmeistarafelagið o. o.

A stovnandi aðalfundinum mikudagin verður vald ein 7-mannanevnd.

Í BLAÐNUM Í DAG



Neistin vann toppdystin hjá kvinnum

VB var í Havn um vikuskiftið og leikti toppdyst móti Neistanum, sum vann oddadystin 20-17. Hjá monnunum vóru tveir dystir í ovara bólki. VÍF vann 31-25 móti KÍF og Kyndil vann tepran sigur 24-23 á StÍF.

Búskaparstýringin mennast

Búskaparligu stýringstrupulleikarnir hjá landsstýri og løgtingi koma serliga til sjóndar, tá avmarkaði peningurin á fíggjarlógini skal raðfestast ella býtast. Bøtt verður nú um hetta við nýggjari lóg um almennan roknskap.

Ísrael og PLO nýggjar samráðingar

Ísrael og PLO fóru í gjár í egyptiska býnum Taba undir nýggjar samráðingar um gildissetan av sjálvstýrisavtaluni fyri palestinar í ísraelskt hersettu økjunum. Ein viðkvæmur spurningur er løgverjulið

Føroyar mennast sum ferðamannaland

Tað tekur sína tíð at byggja eitt land upp sum spennandi ferðamannaland. Til hetta krevst nógv tol, sigur ferðamannastjórin á Akranesi, Þórdís G. Arthursdóttir, sum hevur verið í Føroyum í eina viku fyri at leggja føroyingum lag á.

Rúrdrekkaráðið kannar fallandi rúsdrekkasølu

Tað ber ikki til at siga, at føroyingar drekka minni, bert tí at sølan av rúsdrekka minkaði nógv í 1993 í mun til árið frammanundan. Tí er Rúsdrekka- og Narkotikaráðið farið undir at kanna, um fólk ganga aðrar vegir eftir einum rúsi.

Atlantsflog økir flúgvingina

Nú er nærum greitt, at Atlantsflog í framtíðini fer at flúgva til Noregs. Norsku myndugleikarnir hava játtað Atlantsflog konsessiónina millum Keypmannahavn og Tróndheim. Væntandi taka danir undir við ætlanunum.

Prentlutir

✔ Skjót avgreiðsla
✔ Kappingarførur prísur

Ring tlf. 11212

Dimmalætting